gult4 cyan4 magenta4 svart4

Tað segði click

Ein deiliga tung útgáva av Clickhaze rokkaði á Platform hóskvøldið í einari øðrvísi útgávu av einum hóskvøldi á Jazzfestivalinum.

JAZZFESTIVALUR
Rúnar Reistrup

– Shh tig! Ikki tosa!
– Flyt teg. Ikki standa fyri!
Tað var ikki lætt at vera selskabligur á Platform hóskvøldið. Fólk flest vóru ikki á Platform fyri at práta við onnur, drekka øl, ella hyggja at hvørjum øðrum og hvat man annars kann fáa tíðina at ganga við eitt hóskvøld í Havn.

Tey vóru komin fyri at lurta.

Fólk møttu stundisliga, sum fólk vanliga gera til konsertir, og tey trý korterini, sum gingu frá at hurðurarnar vórðu lætnar upp til nakað hendi á pallinum kendust drúgv fyri tey, hóast barrin var opin, og tónleikur var í hátalarunum, og alt annars minti um eitt vanligt hóskvøld í býnum.

Pussað og brýnt

Hvat var hetta? Ein konsert á Jazzfestivalinum ella eitt kvøld á Platform við einum tónleikaligum innslagi? Tað var ógreitt.

Men so ikki kortini.

Tí so skjótt Clickhaze trein á pallin segði tað click, og við eitt bleiv barrin hálvtóm, fólk tagnaðu og nógv settu seg heilt fram undir pallin at lurta.

Hvar man sat kundi fyri so vítt gera tað sama, tí ljóðið í rúminum var einki at rópa hurrá fyri, men tað var Clickhaze hinvegin. Bólkurin er við tíðini og roynd-unum blivin pussaður og brýndur og hevur soleiðis ment seg frá at ganga undir heitinum »spennandi øðrvísi bólkur« til at osa av góðari dygd og spæligleði. Tað kundu dómararnir á Prix Føroyum staðfesta, og tað kundu áhoyrarnir hóskvøldið skriva undir uppá.

Onkur vil kalla tað, at Clickhaze hevur mist nakað av sínum sereyðkenni og er farið at líkjast meira útlendskum fyrimyndum. Men hin møguleikin er, at bólkurin nú hevur funnið ta hárfínu balansuna millum originalitet og popularitet, sum ger ein góðan bólk.

Á skránni fyri kvøldið vóru bæði Marygold og Clickhaze, men vegna forfall bar tíverri ikki til hjá Marygold at koma á pallin. Fyri at pallurin ikki skuldi standa tómur, lat Clickhaze ljóðførini sita í forsterkarunum longri enn ætlað, og tað hóvaði áhoyrunum.



Tónleikurin hjá Clickhaze er blivin deiliga tungur

Candyfloss til oyruni

Frá at hava verið heilt niðri á bara 700 áhoyrarum er árliga uttandura konsertin á ólavsøku komin fyri seg aftur. Í fjør setti hon met við 3500 áhoyrarum, og nakað tað sama er væntandi í ár. Hetta gevur pen tøl á botnlinjuni hjá FUT.

KONSERT
Rúnar Reistrup

Ólavsøkukonsertin er aftur blivin eitt hitt

Á tíðindafundi á nýggja in-staðnum í Havnini, Platform, royndu umboð fyri Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT) at lansera komandi útgávu av árliga afturvendandi ólavsøkukonsertini sum eina vælumtókta og »in« konsert. Og tað var ikki heilt av leið, tí sum áhoyraratølini frá í fjør tíðiliga avdúka, so er talan um einki minni enn størstu konsert á árinum.

Nøvnini, sum spæla á konsertini á ólavsøku í ár eru eisini bólkar, sum hvør sær draga nógv fólk. Talan er um nakrar av allarbestu tónleikabólkunum í Føroyum, allir savnaðir á einum palli. Hesir eru Frændur, MC-Hár, I Am, Týr, Clickhaze, Flux, Faroe Teens, All That Rain og Tangz.

– Hetta er candyfloss til oyruni, segði Jón Tyril, nevndarlimur í Tutl, á tíðindafundinum og spaði her ólavsøkukonsertina sum eitt ljómandi alternativ til alt tað tvætlið av heliumballónum, blinkandi tarvahornum og candyflossi, sum verður keypt á ólavsøku.

Nevndarlimirnir í Føroya Undirhaldstónleikarafelag Jón Tyril, Torbjørn Lisberg og Kaj Johannesen, formaður, løgdu fram skránna til Ólavsøkukonsertina

Gongur væl hjá FUT

Prísurin á atgongumerkjum til Ólavsøkukonsertina liggur um hálvtannaðhundraað krónur, og tá ikki færri enn 3500 atgongumerki vórðu seld á ólavsøkukonsertini farna ár er einki at taka seg aftur í, at tað klingaði væl í kassanum hjá FUT í fjør.

Tað kávaðu nevndarlimirnir í FUT heldur ikki út yvir á tíðindafundinum, har teir eisini boðaðu frá hvat teir ætla at brúka betraðu fíggjarstøðuna til.

– Í heyst og í vetur fara vit at taka tiltakið »Futti á ferð« uppaftur, og ætlanin er, at tað skal gerast ein fastur táttur annaðhvørt ár, tá Prix Føroyar ikki er.

»Futti á ferð« inniber at FUT skipar fyri konsertum kring landið har eitt rímiliga kent navn er á palli. Teir minni kendu bólkarnir í økinum fáa so eisini høvi at fara á pallin og vísa hvat teir kunnu.

Eisini spæla tey í FUT sær við tankanum um at fáa okkurt kent útlendskt navn við á ólavsøkukonsertina komandi ár.

Ólavsøkukonsertin verður sum vanligt hildin 27. juli. Farnu árini hevur tað gingið væl at hava konsertina í Kommununskúlagarðinum og har verður hon eisini í ár. Soleiðis sær tað nú út til, at ólavsøkukonsertin endiliga hevur funnið eitt fast pláss eftir at hava reikað runt um so at siga allan Havnar bý frá ári til ár.

gult5 cyan5 magenta5 svart5

Fakfeløgini gera bart:

Tryggingartakarin skal eiga Føroya Lívstrygging

Fyri tveimum árum síðani ognartók landsstýrið Føroya Lívstrygging. Felagið varð tá umskipað til alment partafelag. Fakfeløg, ið hava sínar eftirlønarskipanir í LÍV, meta, at LÍV er sjálvsongarstovnur, og at landsstýrið tí hevur borið seg skeivt at. Málið endar í rættinum

ALMENN PARTAFELØG
Stefan í Skorini

Ikki øll viðkomandi skjøl vórðu løgd fyri Vinnunevnd Løgtingsins, tá støða skuldi takast til, um LÍV skuldi skipast sum alment partafelag. Hetta vil ein samráðingarbólkur vera við. Bólkin hava fakfeløgini, ið hava sínar eftirlønarskipanir í LÍV, valt.

Løgfrøðingurin hjá landsstýrinum kom til ta niðurstøða, at Føroya Lívstrygging var ein almennur stovnur, og tí kundi Landsstýrið umskipað hann til alment partafelag. Samráðingarbólkurin vil hinvegin vera við, at ein annar løgfrøðingur kom til eina aðra niðurstøðu í einum øðrum skjali, sum sigur, at Føroya Lívstrygging er sjálvsognarstovnur. Hetta skjalið varð ikki lagt fyri Løgtingið, vísir bólkurin á, og tí varð viðgerðin ikki var nøktandi. Løgtingssamtyktin er tískil gjørd á skeivum grundarlagi.

Tí hevur bólkurin fyrireikað eina stevning um ólógliga ognartøku og biðið Landsstýrismálanevndina kanna málið. Um hetta ikki gevur úrslit, so fara fakfeløgini at seta á stovn sína egnu eftirlønarskipan.

Vilja hava ávirkan

Í samráðingarbólkinum, sum fakfeløgini hava valt, sita Jógvan Mørkøre, formaður, Andreas Ziska, Leif Ellingsgaard og Gunnleivur Dalsgarð. Ingi Højgaard, advokatur, er samskipari og ráðgevi hjá bólkinum.

Føroya Lívstrygging varð sett á stovn fyri at tryggja eftirlønaruppsparingar, og uttan eftirlønartryggingar hjá fakfeløgum, so var eingin Lívstrygging. Hóast fakfeløgini siga seg eiga 80% av LÍV, hava tey ongan nevndarlim og harvið onga ávirkan. Ynskið hjá teimum er, at tryggingartakarin fær ávirkan í nevndini og sleppur at velja sær nevndarlimir. Tey fílast eisini á, at teir roknskapir, ið verða fyrilagdir, ikki eru nóg nágreiniligir, og at tey ikki fáa innlit í tølini.

Tey vilja hava gjøgnumskygni og ávirkan, tí tey meta seg eiga stovnin. Avlopið er eisini alt ov lítið. Um tryggingartakararnir fingu síni umboð í nevndina, hevði LÍV verið betri rikið.

Samráðingarbólkurin hevur seinasta árið verið í samráðingum við Føroya Landsstýri um at finna eina loysn. Ætlanin var býta LÍV upp í tvey feløg. Eitt eftirlønarfelag og eitt lívstryggingarfelag.

Samráðingarbólkurin sigur, at landsstýrið nú dregur í land aftur og ikki vil geva teimum tær sømdir, sum komið varð ásamt um. Hetta vilja tey ikki lata sær lynda og fara tí víðari við málinum.

Jógvan Mørkøre sigur, at hetta snýr seg um rættin hjá einum fakfelag at hava ein pensjónskassa. Kravið er, at tryggingartakarin velur nevndina og ikki Føroya Landsstýri.

Samráðingarbólkurin hjá fakfeløgunum fyrireikar nú eina stevning móti Føroya Landsstýri fyri ólógliga ognartøku. Tey vilja hava gjøgnumskygni og ávirkan á Føroya Lívstrygging,sum tryggingartakarin eigur, meta tey

Mynd: Jens Kr. Vang

Menningartarnað flyta inn í Smærugøtu

Boðið, sum Sjálvsognarstovnurin Sambýlir hevur givið upp á eini hús í Smærugøtu í Havn, er góðtikið, og stovnurin hevur fingið at vita, at tey kunnu keypa húsini

SAMBÝLI
Stefan í Skorini

Í sambandi við grein í Sosialinum í gjár um sambýli til menningartarnað í Smærugøtu kunnu vit upplýsa, at eigarin av húsunum hevur játtað at selja húsini til sjálvsognarstovnin. Hetta upplýsir Marita Weihe, formaður í nevdini hjá stovninum. Enn er tað formella í sambandi við søluna tó ikki undirskrivað.

Fólk í Smærugøtu mótmæla, at enn eitt sambýli verður lagt í grannalagnum, tí tey hava tvey frammanundan. Líkt er ikki til, at teirra mótmæli verða hoyrd.

Marita Weihe váttar, at ætlanin er at leiga húsini til Serstovnadeildina, sum skal nýta húsini at hýsa brekaðum menniskjum.

Bundna uppgávu

Sjálvsognarstovnurin hevur eina bundna uppgávu. Tað er at fáa hús til vega ætlað menningartarnaðum fólki. Marita Weihe sigur, at nevndin hevur roynt at keypa fleiri hús seinasta árið, men ongantíð er tað eydnast, tí onkur hevur havt hægri boð.

Stovnurin kann ikki sambært viðtøkunum fara undir bygging av húsum, men skal keypa liðug hús. Stovnurin roynir eftir førimuni at nøkta tørvin, sum annars er ógvuliga stórur, og hetta keypið loysir ikki trupuleikan til fulnar.

Annars heldur Marita Weihe, at tað hevði verið rættast, um landið bygdi bústaðir til tey brekaðu, ístaðinfyri, at ein stovnur arbeiðir við at keypa hús til endamálið.

Annars sigur nevndin, at tey ikki skilja atfinningarnar hjá grannunum í Smærugøtu, tí øll skulu hava ein bústað, eisini tey við breki.

Annars hevur Javni – landsfelagið teimum evnaveiku at bata – sent eitt hvassorðað skriv, har tey vísa á teirra sjónarmið í sambandi við mótmælini hjá fólki í Smærugøtu. Skrivið er prentað á síðu 8 í dagsins blaði.